## Dystirnir um páskirnar

*Niðanfyri er víst dystaryvirlitið um páskirnar. Dystirnir eru vístir vinstrumegin, meðan ásettu dómararnir eru vístir høgrumegin*

**Kappingin um løgmanssteypið**

**Skírishósdag**

| | |
|---|---|
| 1. KÍ-Sumba | Niklas á Líðarenda |
| 1. NSÍ-VB | Oddmar Andreasen |
| 2. B71-B36 | Jens Petur Brattalíð |
| 2. B68-ÍF | Lassin Isaksen |
| 3. HB-GÍ | Suni Johansen |
| 3. FS Vágar-TB | Sjúrður Norðbúð |

**Páskaaftan**

| | |
|---|---|
| 1. KÍ-NSÍ | Petur Reinert |
| 1. VB-Sumba | Kim Ejdesgaard |
| 2. B36-B68 | Oddmar Andreasen |
| 2. ÍF-B71 | Niklsa á Líðarenda |
| 3. GÍ-FS Vágar | Jens Petur Brattalíð |
| 3. HB-TB | Birgir Sondum |

**Landskappingin**

**1. deild, menn**
**2. páskadag**

| | |
|---|---|
| B68-FS Vágar | Petur Reinert |
| B36-GÍ | Suni Johansen |
| Sumba-VB | Birgir Sondum |
| B71-HB | Niklas á Líðarenda |
| KÍ-NSÍ | Oddmar Andreasen |

**3. deild, menn**
**2. páskadag**

| | |
|---|---|
| B68-FS Vágar | Jonhard Hansen |
| B36-ÍF | Ólavur Weihe |
| TB-VB | Lars Müller |
| B71-AB | Jóhan Krogh |
| KÍ-Skála | Magni Hansen |

**Kvinnudeildin**
**Páskaaftan**

| | |
|---|---|
| B. B71-B36 | Hans F. Hansen |

**2. páskadag**

| | |
|---|---|
| A. HB-Skála | Sjúrður Norðbúð |
| A. VB-Sumba | Zoran Mancic |
| A. GÍ-AB | Jan Skoradal |
| B. NSÍ-EB/Streymur | Aron Olsen |

## GÍ nýggjan høvuðsstuðul

*Kaupthing og GÍ hava skrivað undir avtalu, sum ger nýggja bankan til høvuðsstuðul felagsins*

Í tíðindaskrivi verður boðað frá, at GÍ og íløgubankin, Kaupthing, hava skrivað undir sponsoravtalu, og at Kaupthing sostatt verður nýggjur høvuðsstuðul hjá felagnum.

Framman undan hevur GÍ tveir aðrar høvuðsstuðlar, nevnliga Mjólkavirki Búnaðarmanna og Føroya Bjór.

**Lættir um**

GÍ boðar frá, at leiðsla felagsins sær fram til samstavið við nýggju stuðlarnar.

Serliga siga tey hetta kemur væl við, í sambandi við ungdómsarbeiði felagsins, eins og munagóða avtalan eisini lættir um dagliga raksturin í felagnum.

Sponsoravtalan við GÍ er fyrsta avtala av hesum slag, sum Kaupthing hevur gjørt, síðani bankin kom á føroyska marknaðin.




*Helgi L. Petersen og Óli Hansen, ílætnir nýggja búnan við Kaupthing á bringuni*

## KÍ styrktu um oddastøðuna

*Løgmanssteypið: Sannlíkið er stórt fyri, at ein av fjórðingsfinalunum verður í Klaksvík, og at NSÍ í einari aðrari skal á Svangaskarð*

Í góðum líkindum vann KÍ týskvøldið 2–0 í Runavík. Málini komu síðsta lítla korterið. Ove Nysted, sum hevur gott máltev, setti høvdið undir hornasparksinnlegg úr høgru, tá hann skoraði til 1–0, og í yvirtíðini, tá NSÍ í royndini at javna hevði alt fólkið frammi, staðfesti Heðin á Lakjuni, eftir at hann hevði fingið tvørbólt frá Arnoldi Joensen.

Tað var góð ferð á, spælbýtið var javnt, og avrikini bendu á, at bóltførleikin er betri, enn hann var fyrr í vár. Bæði liðini vóru álopshugað, men upplagdu møguleikarnir vóru ikki so nógvir.

Hesa ferð spældi NSÍ við Kára Hansen á aftasta manni. Í undanfarnu dystunum hava teir havt flata verju. Í 2. hálvleiki komu Mortan Hansen og Jan Nónklett á vøllin fyri ávikavíst Sonna L. Petersen og Jónstein Petersen.

Hjá KÍ var unglingaspælarin Hjalgrím Elttør álopsmaður í høgru inntil Arnold Joensen, sum hevur verið skaddur, loysti hann av. Í 2. hálvleiki avloysti Andrzej Pacek, sum hevur verið skaddur, Niclas Niclassen í miðverjuni, og unglingaspælarin Símun Joensen kom síðstu løtuna á miðvøllin fyri veteranin Jan Joensen.

Dystirnir Sumba–VB, GÍ–HB og KÍ–VB eru framvegis útsettir. Ætlanin var at spæla í Gøtu týskvøldið, men har gjørdist einki, tí vøllurin var frystur. Nú hevur FSF gjørt av, at dystirnir skulu avgreiðast soleiðis: GÍ–HB skal spælast mikudagin 3. mai, KÍ–VB skal spælast fríggjadagin 5. mai, og Sumba–VB skal spælast mikudagin 10. mai.

JH

**Støðan í bólki 2**

| Lið | d | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KÍ | 3 | 3 - 0 - 0 | 10 | 3 | 7 | 9 |
| 2 NSÍ | 4 | 2 - 0 - 2 | 8 | 4 | 4 | 6 |
| 3 Sumba | 3 | 1 - 0 - 2 | 3 | 10 | -7 | 3 |
| 4 VB | 2 | 0 - 0 - 2 | 2 | 6 | -4 | 0 |

**NSÍ-KÍ 0-2 (0-0)**
0-1 Ove Nysted 77
0-2 Heðin á Lakjuni 90

Dómari: Niclas á Líðarenda

**NSÍ:**
Rúni Joensen – Dánial Hansen, Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Sjúrður Jacobsen – Sonni L. Petersen, Brynjolvur Nielsen, Djóni N. Joensen, Jónstein Petersen – Gert Langgaard, og Christian Høgni Jacobsen

**KÍ:**
Meinhardt Joensen – Harley Bertholdsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen, John Ryan – Marek Vierzbicki, Jan Joensen, Rógvi Jacobsen – Hjalgrím Elttør, Ove Nysted, Heðin á Lakjuni

nøvnnú

**Heilsanir**



***Altí› hevur tú smurt og "smuksera"***
Ert tú nøgdur vi› úrsliti›?? Hjartaliga tillukku á 17 ára degnum.
***Ynskja vit í Heygskróki***



***Tillukku vi› gullinum Niels og Kristina***
Nógvar løtur hava veri› gull verdar, gó›an byr framyvir.
***Heilsan vinir***



***Gó›u tit bæ›i!***
Hjartaliga tillukku á gullbrúdleypsdegnum 23. apríl. Takk fyri at vit kunna gle›ast saman vi› tykkum.
***Heilsan Ása***



***"Smil til fotografen, mamma"***
Ja, ta› kundi nú ver›i eitt vakrari smíl, ha? Náh, men tillukku vi› 41 ára fø›ingardegnum tann 23. apríl.
***Heilsan børnini***



nøvnnú nøvnnú nøvnnú nøvnnú

**Heilsanir**



***Gó›u tit bæ›i***
Hjartaliga tillukku vi› gullbrúdleypsdegnum 1. páskadag. Takk fyri alt tit eru fyri okkum.
***Heilsan ommu- og abbabørn, langommu- og langabbabørn***



***Gó›i allarbesti Finn-abbi***
Hjartaliga tillukku á 75 ára fø›ingardegnum.
***Ynskja vit abbabørnini: Frí›a, Finnur, Silja, Andreas og Jóhannes***



***Her eru tær…***
Mjølnirdamurnar í 2 deild, hjartaliga tillukku vi› bronsuni, tit eru bara "Kul".
***Ein leikari***



***Gó›a Marna***
Tillukku vi› 40 ára fø›ingardegnum.
***Heilsan Gula***



***Gó›a Marna***
Tillukku vi› 40 ára fø›ingardegnum.
***Starvsfelagarar***



***Gó›a Sunneva***
Tillukku vi› 8 ára degnum flaggdagin.
***Ynskja mamma, babba, Sólbjørg og Snar***



***Elska›a dóttir***
Hjartaliga tillukku vi› 3 ára degnum 23. apríl. Jesus pápi signi framtí› tína.
***Muss og klemm, mamma og babba***



Hvør skuldi trú at hendan blívur 40.
***Heilsan svimjiklubburin***



***Gó›a fitta Judit***
Hjartaliga tillukku vi› 4 ára fø›ingardegnum 24. apríl. Jesus pápi signi framtí› tína, eg elski teg.
***Heilsan mamma***



***Gó›i elska›i Sigurd***
Hjartaliga tillukku á 19 ára degnum tann 23. apríl og nógv gó› ár í framtí›ini. Takk fyri at tú ert so gó›ur vi› meg.
***Ynskir daman***



***Gó›a fitta langa!***
Hjartaliga tillukku vi› degnum tann 19. apríl, og takk fyri alt tú ert fyri meg. Eisini ein heilsan til langabba.
***Kærar heilsur frá Dánial***
P.S. Vit síggjast til fø›ingardagin.



***Gó›i babba***
Hjartaliga tillukku vi› 50 ára degnum, vit elska teg.
***Maria, Pætur og Heini***



***Elska›i ma›ur***
Hjartaliga tillukku vi› degnum. Takk fyri tí›ina í Grønlandi. Eg elski teg.
***Kona tín***



***Gó›a Rannvá***
Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardegnum tann 18.
***Vivian xxx***



***Er ta› nakar, i› kennur henda piparsvein?***
… um ikki, so er hann ledigur. Hjartaliga tillukku vi› 30 ára degnum.
***Ynskja, gita hvør!!***

**T¿kk**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vi› morgunsangi, talum, gávum, blómum, fjarritum, uppringingum og á annan hátt gjørdu gullbrúdleyp okkara 25. mars 2000 ógloymandi. Og ynskja vit tykkum gle›iligar páskir.
***Heilsan vi› sálmi 34***
***Ruth & Robert***



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vi› blómum, fjarritum og uppringingum gleddu okkum á diamantbrúdleypsdegnum 25. mars 2000. Eina serstaka tøkk til børnini vi› familju.



***Gó›a Turi›***
Hjartaliga tillukku vi› degnum, Jesus pápi signi teg.
***Omma, abbi, mamma, babba og Beinta***



***Gó›a fitta lítla Karin***
Omma og abbi í Jørundsgøtu 17, ynskja tær tillukku vi› 3 ára degnum 1. páskadag. Jesus signi framtí› tína.
***Omma og abbi***